Fylgiskjal 6

LM-079/2023

KLINTRA
Software Solutions

"Uppskot til løgtingslóg um heildarætlan fyri Kjarnuna (verklag um nútímansgerð av Toll- og skattaskipanum 2024 til 2029)"

Ummæli frá Sp/F Klintra

Fyrst av øllum harmast vit um útboðsleistin, har val av bæði veitarum, tøkni og tilgongd eru gjørd undan útboðnum á einum, eftir okkara tykki, ov veikum grundarlagi. Valdi leisturin gevur verkætlanini stóran váða, játtanarmynduleikanum ongan møguleika fyri eftirliti og eina avlaging av kt-vinnuni.

Váði

Verandi útboð, sum í kostnaði er sett til heilar 150 mill. krónur er óvanliga stórt – serliga í føroyskum kt-høpi – og ikki samanbæriligt við nakað annað útboð her heima. Við stórari verkætlan og stórari játtan verður váðin í verkætlanini stórur.

Mælt verður til at verkætlanin verður lutað sundur í smærri verkætlanir, sum hvør sær verða boðnar út. Fleiri veitarar kunnu bjóða, verkætlaninar verða minni, rætti prísurin fæst við útboði, og á henda hátt minkar váðin. Gongur ein verkætlan illa, er einklari at fylgja upp og viðgera trupulleikan. Møguligir tvídráttir millum keypara og veitara hava ikki ávirkan á aðrar verkætlanir/veitarar.

Javnbjóðis kapping

Verandi útboð, har 2 veitarar – Elektron og Formula frammanundan eru valdir til hvør sín part – leggur als ikki upp til javnbjóðis kapping og er tað sera harmuligt. Vanliga verður hildið, at kapping brýnir fyritøkur til at veita vørur/tænastur fyri kappingarføran prís. Við at lata eina ovurhondsstóra upphædd út til tvær fyritøkur, uttan at nøkur verulig kapping hevur verið, er í sjálvum sær skeivt og tað avlagar kt-vinnuna. Somuleiðis er hetta eitt stórt brot á eina grundreglu í almennum keypspolitikki.

TAKS er KT veitari hjá sær sjálvum

Lagt verður upp til at TAKS við ráðgevara skipar menningararbeiðið við innkeyptari arbeiðsmegi. TAKS tekur hervið veitaraskylduna at veita eina KT-skipan á seg sjálvt – KT-veitararnir hava bert skyldu at veita arbeiðsmegi. Tá TAKS hevur veitingarskylduna av KT-skipanini er eingin veitari at krevja nakað av uttan arbeiðsmegi fyri gjald. Kann man ímynda sær henda leist brúktan í byggivinnuni til stórar verkætlanir? T.d. Fróðskaparsetrið, sum skal byggja nýggjan bygning, sjálvt fer at standa fyri kostnaðarmetingini og byggingini við innkeyptari arbeiðsmegi og sjálvt hava ábyrgdina av at bygningurin verður bygdur fyri tann kostnað, sum er upplýstur fyri løgtinginum?

Eisini er vert at nevna at tá alt arbeiðið verður tikið inn á ein stovn, verða uppgávurnar at seta krøv til kt-loysn, veiting av kt-loysn og eftirlit av arbeiðið útinntar á sama stað – tað fæst einki munagott eftirlit tá man hevur eftirlit við sær sjálvum. Betri er at veitingarskylda er hjá kt-veitara og keypari (TAKS) kann tryggja sær at veitingin er sum avtalað.

KLINTRA
Software Solutions

Útbjóðingarleisturin er avgerðandi fyri hvørjar kt-fyritøkur og førleikar Føroyar ynskja at hava. Útboð eftir arbeiðsmegi ístaðinfyri veitingum/loysnum hevur bert við sær, at føroysku kt-fyritøkurnar fara at minna um vikarbureau heldur enn fyritøkur, ið sjálvstøðugt eru førar fyri at greina og veita eina loysnir fyri avtalaðan kostnað.

Mælt verður til at útboðið skal grundast á kravfestingar og veitingar við veitingarskyldu hjá veitarum.

Útboð av back-end skipanum

Sagt verður at back-end skipanin kann ikki bjóðast út, tí Elektron hevur vitanina, og má tí eisini menna nýggju skipanina. Er hetta so einfalt, og er hetta einasta gilduga grundgeving viðvíkjandi útboði? Tey fólkini, ið ætlandi skulu menna nýggju skipanina, hava í løtuni ikki neyðugu vitanina um økið hjá TAKS – talan er sostatt um, at vitan skal flytast frá fólkunum, ið mentu gomlu skipanina til fólkini, ið skulu menna nýggju skipanina. Vitanin kann eins væl flytast til starvsfólk á aðrari fyritøku enn Elektron.

Tá gamla skipanin varð ment, sá kt-marknaðurin øðrvísi út enn í dag. Í dag eru fleiri fyritøkur sum hvør í sínum lagi hava veitt skipanir, ið eru avgerandi fyri virksemið hjá viðskiftarunum sínum – almennum og privatum.

Mælt verður til, at keypari í størri mun troytir skaran av kt-veitarum fyri at fremja kapping og fáa besta prísin fyri umbiðnu vøruna.

Útboð av front-end skipanum

Veitarin av arbeiðsmegi til menning av front-end skipan er valdur út frá útboði í 2021. Tað útboðið fevndi um 100 tímar um mánaðin í eitt avmarkað tíðarskeið. Út frá hesum útboði tillutar keypari valda veitara arbeiðið til 5-6 fólk í 6 ár, svarandi til fleiri enn 60.000 tímar. Hví verður ikki boðið út av nýggjum, tá størra verkætlanin møguliga er játtað?

Mælt verður til, at ítøkilig umbiðin veiting verður boðin út. Somuleiðis verður mælt til, at sami veitari stendur fyri front-end til viðkomandi back-end skipan.

Front-end tøkni skal vera OutSystems

Í 2021 var eitt útboð eftir OutSystems-mennarum til komandi brúkaramótum (user interface – UI) á nýggju skipanunum. At lóggeva í mun til UI-tøkni meta vit verða eitt strategiskt mistak. UI er sera umskiftiligt og nakað av tí, sum flytir seg allarskjótast í tøkniliga heiminum - "tað, sum er smart í dag er ikki víst smart í morgin". Talan er harafturat um at binda seg til ein og sama veitara (*"vendor lock in"*) við tí váða innan lisenskostnað og veitingartrygd, sum tað inniber.

Mælt verður til at brúkaramótið verður hugsað sum havandi stutta livitíð og, at skipanarbygnaðurin verður hugsaður at tola eitt skifti av brúkaramóti, tá tørvur er á tí. T.d. skal leggjast upp fyri, at OutSystems ikki nøktar tørvin, ið verður eftirspurdur.

KLINTRA
Software Solutions

Tænastusáttmáli

Einki verður upplýst um kostnaðin av at reka skipanirnar ella hvussu raksturin skal tryggjast viðv. førleikum og víðarimenning. Ein drúgvari viðgerð hvat innihaldi og kostnaði viðvíkur eigur at verða partur av verkætlanarlýsingini.

Løgtingsins eftirlit

Verkætlanin inniheldur onga lýsing av skipanunum sum skulu mennast – bert yvirskriftir og heitir á lutskipanum. Við ongum ítøkiligum ásetingum um hvat skipanin skal útinna ber ikki til hjá játtanarmynduleikanum at hava eftirlit við, um peningurin er brúktur rætt. Heldur ikki ber til at meta um, um kostanaðurin er rættur.

Mælt verður til, at lutverkætlanirnar verða lýstar og síðani sendar í útboð.

Nýskapan

Í tilfarinum um verkætlanina stendur stutt og leystliga orðað um nýskapan innan eftirlit. Einki verður sagt um hvussu stórt hetta øki er, men kanska er hetta øki, ið kann mennast mest, eitt nú við dátuvísind og vítlíki.

Mælt verður til, at hetta økið verður tikið úr verkætlanini og skipað sum ein tvørfaklig nýskapanarverkætlan millum Fróðskaparsetrið, TAKS og aðrar almennar stovnar og fyritøkur. Á henda hátt eru størri sannlíkindi fyri at nýggj hugskot birtast innan eftirlit grundað á dátuvísind og vítlíki. Aðrir almennir stovnar kunnu gagnnýta vitanina til at betra um síni eftirlit. Kanska spyrst ein útflutningsvøra burturúr hesum eisini.

Sp/F Klintra,
Tórshavn 12. feb. 2024

Jógvan K. Glerfoss, stjóri

LM-079/2023

TAKS verklagslóg til ummælis - spf Klintra 12. feb. 2024.pdf

Navn	Dagfesting
Jógvan Kristiansson Glerfoss	**2024-02-12**

Skjalprógv

samleikin Jógvan Kristiansson Glerfoss

Skriva

Hetta skjal er undirskrivað við elektroniskari undirskrift sambært ES fyriskipan 910/2014 um PADES – PDF Advanced Electronic Signatures.